gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Barnagarðarnir lata aftur

**1450 børn í Havn sleppa ikki í barnagarð frá í morgin vegna verkfall**

VERKFALL
*Turið Kjølbro*



*1450 smábørn í Havn verða frá hósdegnum rakt av verkfallinum*

Allir dagstovnarnir og frítíðarskúlarnir í Tórshavnar kommunu fingu mánadagin og týsdagin boð frá býráðsumsitingini um at lata aftur frá hósdegnum at rokna. Vaskað hevur ikki verið á nøkrum stovni síðani fríggjadagin. Tað er Katrin Petersen, samskipari á dagstovnaøkinum í býráðsumsitingini, sum hevur givið stovnunum boðini.

- Tað er í samráð við landslæknan, sum er hægsti heilsumyndugleikin, at avgerð er tikin um at lata aftur. Stovnarnir kunnu hava opið í tveir dagar uttan at vaskað verður. Tað er serliga hjá teim smæstu, at smittuvandin er størstur, tí tey eru nógv á gólvinum, sigur Katrin Petersen.

Talan er um 28 barnagarðar, vøggustovur og frítíðarskúlar, sum lata aftur í morgin. Her ganga tilsamans 1450 børn.

## Fakligir dagar

Í Drotning Ingridar barnagarði í Havn fingu foreldrini at teimum 60 børnunum boðini mánadagin, at stovnurin letur aftur.

- Øll foreldur skilja, at vit mugu lata aftur, tá ið tað ikki verður vaskað. Hóast vit taka tað ringasta upp úr gólvinum, so er skitið eftir tveir dagar, sigur Jórun Splidt, leiðari.

Sama støða er í dagstovninum á Argjum. Har eru 72 børn og 20 starvsfólk. Gudrun V. Rasmussen, leiðari, ætlar kortini ikki at sita hendur í favn til vaskifólkið fer aftur til arbeiðis. Frá hósdegnum skipar hon fyri fakligum døgum á stovninum.

- Tað er aldri tíð til fakligt arbeiði vanligar dagar. So vit fara at taka endamálsorðingina fyri stovnin upp at venda og okkurt annað eisini.

Aðrir stovnar kring landið hava longu latið aftur, men í Klaksvík ávirkar verkfallið ikki.

- Vit hava ikki givið okkum far um, at tað bara eru stovnarnir her sum ikki lata aftur. Gerandisdagurin er púra óávirkaður av verkfallinum, burtursæð frá, at tað er ringt at fáa fatur á mjólk, sigur Súsanna Ziska, varaleiðari í Drotning Margrethu barnagarði.

# Johanna fer ikki at bróta verkfallið

**– Áhugi hevur verið at leiga vágssluppina Johonnu til at sigla við farmi, men eigararnir siga nei. Teir fara ístaðin á fiskivinnustevnu við gomlu dámuni úr Vági**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Tey, sum dúva upp á, at Gamla Vágssluppin, Johanna, einaferð enn fer at bjara teimum vørur og farm í einum verkfalli, koma at bíða leingi

Tá ið verkfall hevur verið, plagdi Johanna annars altíð at vera skjót at loysa frá landi at flyta fólk og farm ímillum miðstaðarøkið og Suðuroynna.

Men so verður ikki hesuferð.

Magni Ejdesgaard, formaður í felagnum Johanna, sigur, at, teir hava gjørt av ikki at leggja seg út í verkfallið hesuferð.

– Hetta verkfallið er øðrvísi enn tey, sum hava verið, tí nú siglur Smyril, so at ferðafólk, postur og mjólk verður flutt ótarnað.

Tí fer Johanna ikki at leggja seg út í verkfallið hesuferð, hóast hon plagdi at forvinna fitt av peningi, í støðum sum hesari, so fitt, at tað hevur verið eitt ikki týdningarleyst, fíggjarligt íkast til skipið.

– Vit halda eisini, at vit eiga at virða rættin at fara í verkfall, so tá ið ferðafólk, mjólk og postur verður flutt ótarnað, halda vit ikki, at vit eiga at seta fót fyri verkfallið við at flyta annan, verkfalsraktan farm, sigur Magni Ejdesgaard.

Tí verður Johanna liggjandi. Í hvussu so er fyribils, tí Magni Ejdesgaard kann ikki lova nakað, um verkfallið dregur út, so at matur og onnur neyðsynjarvøra fer at ganga undan í Suðuroynni.

– So kann tað vera, at vit loysa, sigur hann.

Annars sigur hann, at tað hevur ikki sørt av áhuga fyri at fáa hana at sigla.

– Verkfall hevði ikki verið í meiri enn ein dag, tá ið onkur vendi sær til okkara við fyrispurningi um at leiga Johonnu at sigla við farmi. Men vit tóku ikki av, sigur Magni Ejdesgaard.

## Á fiskivinnustevnu

Ístaðin fyri at fara í sigling við verkfalsraktum farmi, er Johanna farin at seta sín dám á fiskivinnuráðstevnuna, sum er í Runavík í hesum døgum.

Teir fóru úr Vági mánakvøldið, inn á Runavík, har ætlanin er at liggja á stevnuni.

Hetta er eitt tiltak, sum vágbingar eru farnir undir av sínum eintingum, tí tað er ikki á skránni fyri stevnuna, at Johanna skal liggja í Runavík.

Magni Ejdesgaard heldur, at tað kundi verið áhugavert hjá stevnugestunum, ikki minst teinum útlendsku, at sæð, hvussu eitt gamalt, føroyskt fiskiskip, sá út.

Tey, sum hava hug, kunnu so fara umborð at síggja skipið.



*Tá ið verkfall hava verið, hevur vágssluppin, Johanna, altíð sett sín serliga dám á støðuna. Men hesuferð, fer hon ikki at sigla, tí hetta verkfallið er øðrvísi*

# Verkfallið darvar ikki skúlarnar - enn

**- Vit heita á næmingarnar um at fara væl um og taka upp eftir sær, tó uttan at taka verkfallsrakt arbeiði upp, sigur Mads A. Winther, rektari í Hoydølum**

VERKFALL
*Turið Kjølbro*



*Mads A. Winther, rektari*

Skúlastjórarnir í Tórshavnar kommunu, annaðhvørt tað eru fólkaskúlarnir ella miðnámskúlarnir, heita í hesum døgum á næmingarnar, um at fara væl um innan teir fýra skúlaveggirnar. Frá mánadegnum hevur ikki verið vaskað orsakað av verkfallinum, men enn er eingin vandi á ferð, skilst.

- Enn er reint og ruddiligt hjá okkum, sigur Petur Dahl, skúlastjóri í Hoyvíkar skúla.

Í Hoyvíkar skúla er ikki tikin avgerð um ella nær, skúlin letur aftur vegna vantandi reingerð. Avgerðin verður tikin í samráð við skúlaráðið. Skúlastjórin væntar tó, at enn ganga nakrir dagar áðrenn tey lata aftur.

- Vit vóru í eini líknandi støðu í 1987, eisini orsakað av verkfalli, og tá høvdu vit opið í eina viku uttan at tað varð vaskað. Vit klára væl at vera inni á sjálvum stovunum uttan at vaskað verður. Men tá ið tað ikki er vaskað í nakrar dagar, er ikki tespiligt á wc-unum og gongdunum, sigur Petur Dahl.

Í Hoyvíkar skúla ganga 380 næmingar. Lærararnir eru 25 í tali.

## Tala til vit og skil

Heldur ikki í Studenta- og HF-skúlanum í Hoydølum darvar vantandi reingerðin enn. Próvtøkurnar ganga sum tær eiga. Tey, ið ganga í 2.HF eru liðug við skrivligu próvtøkurnar og mánadagin eru tey, ið ganga í 3g. eisini liðug við tað skrivliga. Mads A. Winther, rektari, stúrir ikki fyri avleiðingunum av verkfallinum í fyrsta umfari.

- Vit heita á næmingarnar um at fara væl um og taka upp eftir sær, tó uttan at taka verkfallsrakt arbeiði upp. Og allir næmingar skilja álvaran. Øll skulu jú til endaliga próvtøku eina ferð.

Eftir skrivligu próvtøkurnar er vanlig skúlagongd aftur til seint í hesum mánaðinum. Og er verkfallið ikki av, tá ið hon verður tikin upp aftur í næstu viku, verður helst eingin skúlagongd. Og tað er ógvuliga óheppið, sigur Mads A. Winther.

- Til munnligu próvtøkurnar, sum byrja skjótt, hava vit eisini brúk fyri reinum hølum, so heldur verkfallið fram, verða vit øll ávirkað.

Kantinan á skúlanum er skerd. Bert eitt fólk er til arbeiðis og tað er kantinuleiðarin. Tí verður døgverði ikki gjørdur meðan verkfall er.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Hótta við at boykotta Skipafelagið og Eimskip

**Søgur hava gingið um, at Skipafelagið og Eimskip hava brotið verkfallið hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag. Bróta tey bæði Skipafeløgini verkfallið, verða tey boykottað í øllum landinum, tá ið verkfallið er av**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

Skipafelagið Føroyar og Eimskip hava nú fingið greið boð frá Føroya Arbeiðarafelag.

Føroya Arbeiðarafelag hevur fingið upplýst, at Skipafelagið og Eimskip hava tikið sigling upp, sum brýtur verkfallið hjá verkamannafeløgunum.

Hetta hevur fingið Føroya Arbeiðarafelag til at gera vart við seg og til at geva teimum báðum skipafeløgunum greið boð.

– Vit hava skrivað Skipafelagnum og Eimskip bræv, har vit gera teimum púra greitt, at bróta tey verkfallið, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri feløgini, eisini eftir at verkfallið er av og viðurskiftini aftur eru komin í rættlag, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna á Føroya Arbeiðarafelag.

Hetta er bæði galdandi, um nøkur vøra, sum kemur fráverkfalsraktum øki, verður skipað umborð á skipini og um vøra, sum er ætlað verkfalsraktum øki, verður skipað upp.

– Vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at tey bróta verkfallið, sigur hon púra greitt.

Hon sigur, at í brævinum til Skipafeløgini, verður gjørt greitt, at bróta tey verkfallið nú, fara tey at verða boykottað í øllum landinum, tá ið verkfallið er av.

– So fara vit at nokta øllum okkara limum at at avgreiða farmaskipini, ella á annan hátt at arbeiða saman við fólki, ella á virkjum, sum hava við skip ela flutning hjá feløgunum at gera.

Tað merkir, at so kunnu tey bæði feløgini ikki brúka limir hjá Føroya Arbeiðarafelag til at lossa og lasta skipini í nakrari Havn í Føroyum, har verkafólkið eru limir í Føroya Arbeiðarafelag.

Tað vil í veruleikanum siga, at hendir tað, fáa Skipafelagið og Eimskip als ikki virkað nakrastaðni í landinum, uttan í Havn og í Klaksvík.

Annars kann tað eisini fáa aðrar avleiðingar fyri tey bæði feløgini um tey bróta verkfallið.

Á Skrivstovunum hjá feløgunum arbeiða fleiri limir hjá S&K, sum eisini er limur í Føroya Arbeiðarafelag.

Og taka tey verkfalsrakt arbeiðið upp, hóttir Føroya Arbeiðarafelag við at lata limirnir hjá S&K, sum arbeiða á feløgunum, fara í samhugaverkfall.



*Hóast vegurin í Kollafirði er avbyrgdur, er onkur, sum roynir at troka seg ígjøgnum byrgingina. Her eru tað ein jeepur og ein lastbilur, sum troka hvør sín veg. Lastbilurin slapp ikki væl frá atsóknini, tí hann fekk skaða av tunnunum og mátti setast. Jeepurin slapp ígjøgnum*

## Nógvur skeivar fráboðanir

Annars sigur Elias Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag, at felagið fær nógvar fráboðanir um verkfalsbrot av ymsum slagi

Men hesar fráboðanir eru verri enn so altíð eftirfarandi, tí ofta er talan um misskiljingar og skeivar fráboðanir.

– Tá ið vit so kanna málið vísir tað seg, at í heilt nóvum førum er onki hald í teimum fráboðanum, vit fáa um verkfalsbrot. Hinvegin er hald í øðrum fráboðanum og tey málini taka vit upp.

# Leggur Løgtingið upp í verður ikki lukkuligt

**Leggur Løgtingið upp í verkfallið, fara vit at brúk allar okkara kreftir, hetta til valið at mótarbeiða teimum politikarum, sum ger tað, sigur Ingeborg Vinther**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*



*Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag fýrir ikki fyri at ferðast ímillum meiniga verkafólkið í teimum blokadum, sum nú eru settar í verk. Hon lovar ilt, um Løgingið skuldi funnið upp á at lagt upp í verkfalli. Aftanfyri sæst Andru Vinther, maður Ingeborg*

– Leggur Løgtingið upp í verkfallið, verður tað ikki lukkuligt.

Ingeborg Vinther ger beinanvegin greitt, at er tað nakar sum hugsar um at politiska uppíblanding í verkfallið, er tað ikki nakað, sum verkfeløgini fara at góðtaka.

–Tað skal kosta teimum dýrt, leggur hon dent á.

Tað frættist annars, at ávísir politikarar longu høvdu ætlanir um at leggja seg út í verkfallið, hóast tað ikki hevur vart meiri enn í eina viku. Men síðani er hetta afturvíst av sjálvum Løgmanni.

Men fyri at ongin ivi skal vera um, hvørja støðu verkafeløgini hava til hetta, ger hon beinanvegin greitt, at tey fara ikki at lata sær lynda, at politikarar leggja seg út í verkfallið, sum teir onkuntíð hava gjørt, seinast tá ið ósemjan um Brimil var.

– Fer løgtingið at leggja uppí, fara vit at brúka alla okkara tíð, og allar okkara kreftir, hiðani og líka til komandi løgtingsval upp á at mótarbeiða teimum politikarum, sum gera tað, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at verkafólkið hevur rætt til at berjast fyri sínum rættindum og tann rættin fara tey ikki at góðtaka, at Løgtingið tekur frá teimum við at leggja seg út í verkfallið.

# Okkara arbeiðið er liðugt

**Vit kalla ikki partarnar saman aftur, sigur John Rajani semingsmaður**

VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Okkara uppgáva er liðug. Tí fara vit ikki at kalla partarnar saman aftur.

Tað verður ikki uttan víðari, at semingsmenninir fara at kalla arbeiðarafeløgini í verkfalli og arbeiðsgevararnar, aftur til samráðingarborðið.

John Rajani, annar av semingsmonnunum, sigur, at arbeiðið hjá semingsmonnunum er liðugt, so nú eru teir ikki partur av málinum longri.

– Tí fara vit ikki at taka stig til at fáa samráðingarnar ígongd aftur. Tað er tað í veruleikanum heldur ikki grundarlag fyri at gera tað, tí vit hava ikki frá nøkrum av pørtunum fingið nakrar sum helst ábendingar um, at støðan er broytt.

Semingsmaðurin sigur, at skal semingsstovnurin upp í aftur, verður tað ikki, fyrrenn annar parturin beinleiðis vendir sær til semingstovnin við áheitan um at royna at fáa samráðingarnar ígongd aftur.

– Men skulu vit gera tað, má tann parturin, sum heitir á okkum, geva til kennar, at hann hevur eitt ítøkiligt uppskot, sum ger, at tað er grundarlag fyri at taka samráðingarnar upp aftur.

Annars er John Rajani ikki sinnaður at gera stórvegis viðmerkingar til støðuna.

Vit spurdu hann, um partarnir,eftir hansara tykki, eru langt frá eini semju.

– Tað havi eg onga viðmerking til. Vit kunnu bara staðfesta, at so leingi teir ikki eru samdir, eru teir ikki samdur.

Annars hevur nógv verið tosað um eina avtalu, sum skal vera gjørd í sambandi við sáttmálan, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag øðrumegin og Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík hinumegin.

Avtalan ímillum teirra skal eitast at vera, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag ikki skuldu fáa størri lønarhækking enn Havnar Arbeiðsmannafelag og feløgini í Klaksvík, fingu.

– Tað havi eg onga viðmerking til. Tað einasta, eg kann siga, er, at semingsstovnurin hevur onki við slíkar avtalur at gera,sigur John Rajani.



*Onkuntíð var tætt ímillum løgregluna og blokaduvaktirnar. Her roynir ein politistur at skúgva eina blokaduvakt til viks. Dregur verkfallið út, kann stríðið harðnað. Semingsmenninir gera ikki meiri, fyrrenn teir fáa greiða ábending um, at annar parturin kemur við einum góðum tilboði til hin partin*